## Ísland sum eitt valdømi



Nakrar mánaðir eftir at Føroyar vórðu skipaðar sum eitt valdømi, eru íslendingar farnir at kjakast um at skipa landið sum eitt valdømi. Hugsjónirnar eru tær somu, sum komu fram undir orðaskiftinum her, men tað hevur vakt ans, at ein borgarstjóri á Vestfirðum mælir til eitt valdømi. Grímur Atlason, borgarstjóri í Bolungarvík, heldur, at var landið eitt valdømi, hevði politikkurin lagt størri dent á at gagna heildini og longri fram í tíðina enn nú.

## Mærsk sigur upp

Maersk Line, sum er ein deild av stóra danska felagnum A.P. Møller-Mærsk, hevur samtykt at seta umfatandi sparingar í verk, og tær hava nú við sær, at fleiri hundrað fólk, sum arbeiða hjá felagnum í USA, verða søgd upp. Søludeildirnar, sum Maersk Line hevur í Seattle, San Fransisco, Dallas og Costa Mesa og ein skrivstova í Atlanta lata aftur. Í Charleston letur ein stór deild aftur, og har missa 140 fólk arbeiðið, skrivar Maritime Danmark.

# Brimið tók fleygasessirnar

**Ógvusliga brimið 31. januar gjørdi so nógv um seg, at stórur partur av fleygasessunum suðuri á Urð í Nólsoy eru burtur**

ÓDNARVEÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað kemur alt meiri undan kavi, hvussu nógv ódnarveðrið herfyri hevur gjørt um seg.

Nú frættist, at stórur partur av fleygasessunum suðuri á Urð í Nólsoy eru skolaðir burtur.

- Eg gjørdist púra ovfarin, tá eg var suðuri á Urð herfyri, sigur René Hansen, sum er røktingarmaður í Heimaruhelvt, ið eisini umfatar Urðina.

Hann greiðir frá, at allir teir bestu fleygasessirnir eru púra burtur, og kunnu ikki laðast uppaftur. Báðir sessirnir í Hvíturðini, sum eru sunnastu sessirnir, er heilt burtur, og René metir ikki, at teir kunnu fáast til fleygasessir aftur.

- Bakkin er heilt skolaður burtur, og har kemur eingin nýggjur fleygasessur heldur, sigur René Hansen.



*René Hansen er røktingarmaður á Urðini og av allarbestu fleygamonnum. – Eg vænti, at hetta er endin á lundafleygi í Nólsoy, sigur hann*

*Mynd: Leo Poulsen*

Sama skilið er við tveimum øðrum sessum, Jákupssessi og Getalágni. Sostatt er talan um, at fimm av teimum tólv fleygasessunum á Urðini eru burtur, og gerast ikki aftur.

- Hartil er partur av niðaru Túgvu burtur, so har fleygast ikki longur á lágætt, og Grátið kann ikki brúkast sum er, men kann nokk fáast til fleygasess aftur kortini, metir René Hansen.

Sostatt hevur ódnin, sum var 31. januar, avmarkað lundafleygið í Nólsoy í ólukkumát.

- Eg eri bangin fyri, at hetta er endin á lundafleygi her úti, sigur ein dapurtskygdur René Hansen, sum samstundis er av allarbestu fleygamonnum.

### Frælsið burtur

Tað sigur seg sjálvt, at tá sjey av tólv fleygasessum eru burtur ella hava fingið skaða, so hevur brimið verið ófatiligt. Og tað hevur sjálvandi ávirkað longur niðri móti sjóvarmálanum, tí hesir fleygasessir liggja rímiliga ovarliga.

- Sjóvarurðin er fullkomiliga broytt. Fyrr var hon í mesta lagi tíggju metrar breið, har hon var breiðast. Nú er breiðasta staðið einar 30 til 40 metrar, so tað hava verið ófatiligar náttúrukreftir, sum hava verið upp á spæl, sigur René Hansen.

Hesir fleygasessir eru aldargamlir, so brimið hevur verið verri enn í øldir.



*Verður tað so ringt, sum René Hansen stúrir fyri, fær lundin í Nólsoy frið frameftir*

Eisini heimari á eystursíðini á Nólsoynni hevur nógvi uppgangurin gjørt um seg. Menn hava í øldir havt tvey seyðafrælsir undir Skrið, sum tað verður nevnt, men nógvi uppgangurin hevur havt við sær, at har er ikki moldarklumpurin eftir, og tískil einki hjá seyðinum at eta. So hesi bæði frælsini eru ikki til longur.

Broytingin á Urðini er so ógvuslig, at René Hansen næstan ikki vildi trúgva sínum egnu eygum. Men tað sigur seg næstan eisini sjálvt, tá bara teir ovastu fleygasessirnir sluppu snikkaleysir, meðan teir niðastu heilt eru skolaðir burtur.

Um tað so fer at bera til at laða upp nýggjar fleygasessir, ella um lundafleygið í Nólsoy er at enda komið, so sum René Hansen stúrir fyri, tað kann so bara tíðin vísa.

# Móttøka fyri Onnu

**Í morgin, fríggjadagin, hevur Postverkið móttøku fyri Onnu Thomsen, sum legði frá sær sum postboð í Nólsoy eftir 33 ár**

MÓTTØKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Anna Thomsen byrjaði tíðliga at bera post út í Nólsoy.

- Eg minnist, at eg byrjaði at bera post út – mest Dimmalættingar og tílíkt – fyri pápa mín, longu áðrenn eg dugdi at lesa, sigur Anna Thomsen.

Pápi hennara, Jens Hansen, var postboð í Nólsoy í samfull 44 ár, og tí kendist tað næstan náttúrligt, at dótturin tók yvir. Og tað gjørdi hon á sín hátt við tað at maðurin, Høgni Thomsen, tók yvir poststarvið í Nólsoy. Men Anna hevur fingist við postútbering síðani einaferð fyrst í 40-árunum, so hóast hon alment »bert« hevur verið postboð í 33 ár, hevur hon borið post út í útvið 60 ár, nú hon legði frá sær 1. november í fjør vegna aldur.

Anna Thomsen tók yvir frá manninum í 1992, tó at tey øll árini hava hjálpst at í starvinum.

- Mær hevur dámað arbeiðið ógvuliga væl, sjálvt um tað kann vera illfýsi við hvørt at bera post út, sigur Anna Thomsen.

Hon heldur, at størsta stigið framá innan postyrkið er avgerðin um, at fólk skuldu seta upp postkassar, so tað í mesta lagi gjørdist trý trin hjá postboðunum at ganga upp trappur.

- Fyrr mátti eg ganga upp hundraðtals trapputrin, nú er tað vorðið eitt spæl, sigur Anna Thomsen.

Hon sigur, at hon onkuntíð hevur fingið okkurt skeldið, men sum oftast hevur tað víst seg, at hon hevði rætt, tá til stykkis kom.

Postverkið heldur sum nevnt móttøku fyri Onnu Thomsen, og hon fer fram í Magnussarstovu, sum er eitt av allarelstu húsum í bygdini og samstundis barnaheimið hjá Onnu, har hon bæði er fødd og uppvaksin.

Móttøkan verður millum 15 og 17 fríggjadagin, og í tí sambandi siglir Ritan eykatúr av Bursatanga klokkan 14.

*Hóast Anna Thomsen »bert« var alment postboð í 33 ár, hevur hon borið post út í Nólsoy í útvið 60 ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

